# Burturvið at bjarga Norrönu



*Jørn Astrup Hansen, formaður, og restin av Búskaparráðnum heldur lítið um ætlanirnar hjá landsstýrinum, at bjarga Norrönu*

**- Tað stendur ógreitt fyri okkum, hví landsstýrið hevur ta fatan, at tað ikki kann latast marknaðarkreftunum at tryggja sjóvegis ferðslu til og úr Føroyum, sum ber seg fíggjarliga, sigur Búskaparráðið**

FERÐASAMBAND
*leo@sosialurin.fo*

Búskaparráðið hevur nú gjørt sínar viðmerkingar til ætlanina hjá landsstýrinum at bjarga Smyril Line og harvið framvegis hava Norrönu siglandi.

Og tað er synd at siga, at Búskaparráðið tekur undir við ætlanunum. Og hóast ráðið orðar seg hóvliga, so stendur boðskapurin eftir klokkuklárur.

- At landsstýrið soleiðis fer uppí P/F Smyril Line, sum rekur skip í kapping við privat reiðarí, tykist undranarvert, sigur Búskaparráðið í sínum viðmerkingum.

Teir geva heldur ikki nógv fyri grundgevingunum hjá samgonguni um, at talan er um eina lívsæðr til útheimin, sum má bjargast.

- Tað er grund til at halda, at aðrar handilsligar kreftir fara at fylla tað tómrúm, sum vildi staðist av, at P/F Smyril Line hevði noyðst at givist við Norrönu, sigur Búskaparráðið.

Teir halda tað heldur ikki vera rætt, tá landsstýrið sigur, at eitt fíggjarligt skrædl í P/F Smyril Line hevur við sær, at eingi ferðafólk longur verða førd sjóvegis til Føroya, at tað gerst endin á roll-on roll-off virkseminum fyri føroyingar, og farmaflutningurin til og úr Føroyum gerst ótryggur.

- Tað tykist annars, sum at ein konkursrættarlig regulering av felagsins viðurskiftum hevði verið meiri hóskilig at tikið framum hetta, at endurreisa kapitalgrundarlagið við almennum pengum, sigur Búskaparráðið í sínum viðmerkingum.

Ráðið vísir eisini á, at tað er ikki tørvur á almennum kapitali til at halda eini búskaparliga burardyggari ferðslu gangandi.

### Hóskiligari skip

Spurningur verður eisini settur við, hví landsstýrið tvíheldur um júst Norrönu.

- Er tað avgerandi fyri landsstýrið at hava júst Norrönu siglandi, hevði tað helst verið bíligari at fingið sær ræði á skipinum við at ogna sær 1. veðrættarlánið frá kreditorunum heldur enn, sum nú, at veita felagnum kapital, sum tryggjar allar kreditorarnar hjá felagnum móti tapi, sigur Búskaparráðið.

Teir seta somuleiðis spurnartekin við, um tað loysir seg at reka flutningsvinnu við Norrönu yvirhøvur.

- Eftir fimm árum við støðugum halli fær tað ein at spyrja seg sjálvan, um tað yvirhøvur loysir seg at reka flutningsvinnu við "Norrönu" í Norðuratlantshavi. Tað fær ein at halda, at tað vildi verðið ein fyrimunur, at sett annað hóskiligari skip í siglingina, og tað heldur av handilsligum íleggjarum enn av landskassanum og almennum grunnum, sigur Búskaparráðið.

### Landskassin ábyrgdast

Ráðið vísir eisini á, at fremur landsstýrið hesa ætlanina, so er hon endalig.

- Við einum partameiriluta saman við Framtaksgrunninum og við einum meiriluta í nevndini er landsstýrið í ferð við at yvirtaka ta óavmarkaðu ávirkanina – og ta óavmarkaðu ábyrgdina í reiðarínum P/F Smyril Line, og har vendist ikki aftur, sigur Búskaparráðið.

Teir vísa á, at tað er rættiliga vist, at landskassin kemur at ábyrgjast fyri eitthvørt tap hjá P/F Smyril Line í framtíðini.

- Í Føroyum hava vit ringar royndir av at lata landskassan fara upp í vinnulívið við peningi. Tí er tað ilt at skilja, hví landsstýrið aftur vil royna tað, sigur Búskaparráðið.

Teir enda við einum rættiligum skoti eftir serliga báðum borgarligu flokkunum í samgonguni.

- Tað stendur ógreitt fyri okkum, hví landsstýrið hevur ta fatan, at tað ikki kann latast marknaðarkreftunum at tryggja sjóvegis ferðslu til og úr Føroyum, sum ber seg fíggjarliga, sigur Búskaparráðið at enda í sínum viðmerkingum til ætlanina hjá samgonguni at bjarga Norrönu.

# Vitalitetur má prógvast



*Magni Laksáfoss lovar ikki at taka undir við samgonguni. Tað skal prógvast neyðugt fyri samfelagið at bjarga Norrönu*

**Tað sigur Magni Laksáfoss, limur í fíggjarnevndini, um bjargingarætlanina hjá samgonguni, og hesin skal prógvast, skal hann taka undir við uppskotinum**

FERÐASAMBAND
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru ikki allir samgongulimir, sum treytaleyst taka undir við uppskotinum hjá landsstýrinum um at veita Smyril Line fíggjarliga hjálp.

Magni Laksáfoss, fyrrverandi fíggjarmálaráðharri, krevur í hvussu er prógv fyri, at bjargingin er vital fyri samfelagið.

Hann dregur fram dømi SEV.

- Stóð SEV í fíggjarligari trongstøðu og ikki hevði ráð at keypt olju, so mátti landið traðka til, tí er eingin streymur, steðgar landið upp. Og má sannførast um, at líknandi støða uppstendur, um vit ikki bjarga Norrönu, sigur Magni Laksáfoss.

Hann má tí spyrja seg sjálvan, um Norröna uppfyllir tær treytirnar.

Tá tað kemur til ferðafólk hava vit jú Atlantic Airways, og Ísland er tengt bert at flogferðslu, ikki skipum. So niðurstøðan hjá Magna Laksáfoss er, at ferðaferðslan ikki líkur treytirnar fyri at bjarga Norrönu, tí fer hon, ivast hann ikki í, at annað skip kemur í staðin fyri.

Viðvíkjandi farmaflutningi sigur Magni Laksáfoss, at tað framman undan eru trý onnur feløg, sum røkja farmaflutning til og úr Føroyum. Og tá talan er um ro-ro, er Norröna einasta sambandið í so máta, sum Ísland hevur.

Hinvegin vil Magni Laksáfoss hava greiði á, um Norröna er vital fyri alivinnuna.

- So fyribils er støðan óbroytt, og fyrr enn hon verður broytt, atkvøði eg ikki fyri uppskotinum, sigur Magni Laksáfoss.